Løgbiti nr. 7

# At senda til ummælis

LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Lógartænastan januar 2019**

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 7**

# At senda til ummælis

## Hví?

Eitt lógaruppskot eigur sum avgerandi meginregla at verða sent til ummælis. Tað hevur stóran týdning at fáa greiðu á, hvørja støðu almennir og kommunalir myndugleikar, stovnar, vinnulív, áhugafeløg, borgarar o.o., sum verða ávirkað av lógaruppskotinum, hava til uppskotið, fyri at stjórnarráðið kann gera eina meting av, um lógaruppskotið tøkniliga og innihaldsliga í roynd og veru er í lagi.

Tað er sostatt umráðandi at senda uppskot til ummælis fyri at fáa lýst málið til fulnar, soleiðis at lóggávan verður hóskandi og so lítið fyrisitingarliga tyngjandi, sum til ber. Neilig sjónarmið hava eisini týdning í mun til at fáa lýst grundarlagið fyri lóggávuni til fulnar. Vandin fyri at fáa neilig og atfinnandi sjónarmið er ikki haldgóð grundgeving fyri ikki at senda uppskot til ummælis.

At senda lógaruppskot til ummælis er við til at betra um sakligu góðskuna á lógaruppskotinum, tí tey, sum kenna økið, fáa høvi at siga sína hugsan um uppskotið. Samstundis kann kunnleiki um ymiskar fatanir av lógaruppskotinum gera tað lættari at finna semjur, sum eisini kann lætta um viðgerðina í Løgtinginum seinni. Ummæli hava eisini týdning fyri metingina hjá Løgtinginum av, um uppskotið er gagnligt.

Verður eitt lógaruppskot hóast hetta ikki sent til ummælis, eigur tað í viðmerkingunum til uppskotið at verða grundgivið fyri, hví so er.

## Hvør?

Tá ið uppskot verða send til ummælis, eigur ein ikki at avmarka seg óneyðugt, men heldur senda uppskotið til ein breiðan skara. Endamálið við at senda uppskotið til ummælis er at fáa til vega so nógv sjónarmið sum til ber.

Um ein nevnd ella arbeiðsbólkur hevur gjørt álit í samband við lógaruppskotið, eiga teir myndugleikar, felagsskapir o.o., ið hava havt umboð í nevndini, at fáa uppskotið til ummælis. Hetta er fyri at geva hesum pørtum møguleika til, eftir at nevndararbeiðið er liðugt, at koma við virðismiklum ískoytisupplýsingum, sum kunnu hava týdning fyri endaligu tilevningina av lógaruppskotinum.

Uppskotið eigur at verða sent beinleiðis til øll tey, sum stjórnarráðið veit, verða ávirkað av uppskotinum, umframt at øll uppskot skulu leggjast alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, har øll hava møguleika at senda inn ummælissvar.

Verklagslógir eiga altíð at sendast til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

## Freistir

Tað er umráðandi at seta eina hóskandi ummælisfreist, soleiðis at ummælispartarnir fáa stundir at seta seg inn í uppskotið. Vanliga verður sagt, at ummælisfreistin ikki eigur at vera styttri enn 4 vikur.

Verður uppskotið sent til ummælis, samstundis sum frítíð er, eitt nú summarfrí, jólafrí og páskafrí, eigur ummælisfreistin at leingjast samsvarandi.

Eitt lógaruppskot eigur ikki at verða sent til ummælis, fyrr enn tað er liðugt. Tað vil siga, at viðmerkingarnar til uppskotið eiga at vera lidnar, heruppií eiga fíggjarligar og fyrisitingarligar avleiðingar at síggjast í uppskotinum. Um neyðugt eigur annað týðandi tilfar, sum hevur týdning fyri metingina av lógaruppskotinum, at leggjast við.

Lógaruppskot eiga at hava verið til ummælis, áðrenn tey verða send til eftirkanningar hjá Lógartænastuni.

## Kunngerðir

Somu atlit sum til lógaruppskot eru galdandi fyri sakligu góðskuna á kunngerðauppskotum. Hesi uppskot eiga eisini at verða send til ummælis sum liður í málsviðgerðini eftir som meginreglum, sum frammanfyri eru fyri lógaruppskotini.

Einasti munur millum lógaruppskot og kunngerðauppskot er, at lógaruppskot verða endaliga samtykt í Løgtinginum, meðan kunngerðauppskot verða endaliga avgjørd av viðkomandi landsstýrismanni.